# Tað sær svart út við fuglaveiðuni



Lundin er í minking í ár. Veiða er neyvan orsøkin til tað, men heldur at fuglinum vantar føði

**– Eg kikaði eystur í hav í morgun, men har kundi eg bert staðfesta tað eg visti frammanundan: Har var als eingin svartfuglur at síggja. Soleiðis hevur tað tíverri verið ein stóran part av árinum, sigur René Hansen í Nólsoy. Støðan er hin sama á øðrum støðum í landinum.**

NÁTTÚRAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Svartfuglur:** René er ein av teimum sum dámar væl at vera á fuglaveiðu.

Hann hevur tó sæð og staðfest tann veruleika, at støðan hjá svartfuglinum er alt annað enn góð.

Bæði hjá lundanum, lomviganum og álkuni hevur ein staðfest eina stóra afturgongd í tali. Og einki er sum bendir á nakran bata í so máta.

– Í ár hevur verið sera lítið til av lunda. Ja, eg vil siga, at árið í ár er beinleiðis ússaligt, staðfestir René.

Hann hevur undanfarin ár skrivað væl niður, tað sum menn hava fingið í fleyging. Og her siga tølini alt: Higartil í ár hava teir bert tikið einar 1300 lundar. Eitt miðalár var talið upp móti 12.000!

Úr Skúvoy og Mykinesi berast somu óhugaligu tíðindi.

### Einki rokár

Úr Mykinesi sigur Esbern í Eyðansstovu at gongdin har er hin sama sum á hinum støðunum.

– Støðan er als ikki so góð sum hon eigur at vera, sigur Esbern.

Teir hava nærum ikki sæð sildbera í ár, men hava hinvegin sæð nakað av lunda á sjónum. Trupulleikin hevur bert verið hann, at lundin í alt ov lítlan mun er farin á flog.

Av hesi orsøk hevur jú ikki borið til hjá monnum at fleyga henda lundan. Í ár verður tí ikki talan um nakað rokár hjá mykinesmonnum, tá talan er um fleyging.

Okkurt árið hava teir fingið heilt upp í 25.000 lundar, men í ár man tað neyvan fara at tátta í meiri enn einar 6.000 lundar.

Lítið hevur verið at sæð til lomvigan og álkuna, og tá talan er um rituna er bert ein evarska lítil partur av pisunum komin undan í ár.

– So her er skilligt at her er ikki rætta vorðið við svartfuglinum, sigur Esbern, sum harmast um gongdina.

Orsøkin til hesa negativu gongdina tey seinnu árini er helst vantandi føði hjá svartfuglinum.

### Horvin

René Hansen sigur, at teir fyrr í summar sóu nakað av svartfugli á sjónum kring Nólsoynna. Onkrar dagar hava teir sæð svartfugl í einar 2-3 fylgjandi dagar, men so er hann horvin aftur.

– Men í seinastuni hevur einki verið at sæð, sigur René.

Í seinastu viku var ein maður á fleygi og fekk hann heilar 150 lundar. Hetta var í roynd og veru tað mesta sum nakar maður hevur fingið í summar.

Úr Skúvoy frættist. at har hevur heilt lítil lundi verið í summar. Har kunnu teir taka eini 1000 lundar, men higartil í ár er ikki fleiri enn stórthundrað lundar fleygaðir í ár.

– Eingin veit um slíkt áður. Tað sama ger seg eisini galdandi fyri lomvigan og álkuna, verður sagt.

# Nýggjan skúla til dagsins tørv

**22 ár eru nú liðin síðani vaksið varð um Stranda skúla. Nú er tíðin komin til eina enn størri útbygging.**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Strendur:** Tað var kortini ikki í gjár, tá skúlagongdin byrjaði aftur eftir summarfrítíðina og heldur ikki næsta ár at strandabørn sleppa í tann nýggja og nógv útbygda skúlan.

Men gongst soleiðis sum bygdaráðið ætlar, verður farið undir eina rættiliga umfatandi útbygging í framtíðini av verandi skúla.

Bygdaráðið hevur arbeitt við hesi ætlanini í eina tíð, og fekk í hesum sambandi uppskot frá tveimum arkitektum at taka støðu til.

Arkitektarnir báðir komu við hvør sínari loysn uppá, hvussu ein kundi útbyggja skúlan til tess at lúka øll krøv, sum verða sett einum nútíðar skúla.

Uppskotini vóru ymisk, men á fundi fyrr í summar avgjørdi bygdaráðið at arbeiðast skuldi víðari við uppskotinum hjá Fuglø Arkitektum.

- Hetta uppskotið hóskaði best til tørvin hjá skúlanum, verður sagt úr bygdaráðnum.

Kommunan setti annars ein arbeiðsbólk at arbeiða við hesum málinum. Og eftir avgerðina í bygdaráðnum kann hesin bólkurin nú fara undir næsta stigið í ætlanini at geva strandabørnum betri umstøður í skúlanum.

Verandi skúli á Strondum var tikin í nýtslu í 1969, og varð sum nevnt útbygdur í 1984.

## STUTT SAGT

### Nýggjar egningarskúrar í heyst

**Sørvágur:** Í eina tíð hevur verið arbeitt við at bróta teir gomlu egningarskúrarnar niður, saman við m.a. Toppakkhúsinum fyri at gera økið klárt til nýggju egningarskúrarnar.

Arbeiðiðatstoypagrundina er komið væl áleiðis. Tað er Erik Heinesen úr Bø, ið stendur fyri hesum arbeiði. Hann væntar at vera komin somikið væl áleiðis í næstu viku, at farast kann undir at smíða. Berg Rasmussen, byggimeistari, hevur fingið heildartilboðið av nýggju skúrunum, og skal hann sjálvur smíða.

– Enn er óvist nær skúrarnir verða lidnir og kunnu takast í brúk. Væntandi verður tað í oktober ella november, verður upplýst úr Sørvágs kommunu.

**sb.**

### Breiðka vegin móti Studentaskúlanum

**Hoydalar:** Tað hevur tosað um tað í mong ár, og nú er umsíðir líkt til at okkurt fer at henda á Sanatoriivegnum oman til Studentaskúlan í Hoydølum.

Arbeiðið umfatar eina neyðuga dagføring og umlegging av hesum vegastrekkinum, umframt ætlanina at gera ein gonguteig framvið vegnum. Sunnanfyri skúlan skulu somuleiðis gerast fleiri pláss til bilar.

Ætlanin verður í hesum døgum fyrireikað, og gongst sum ætlað verður arbeiðið boðið út seinni í ár. Einki verður enn sagt um, hvussu nógv hetta fer at kosta.

**sb.**



*Vegastrekkið oman móti Studentaskúlanum hevur leingi trongt til ábøtur. Nú verður tað!*

### Norðurlendskur stuðul til fyribyrging

**Bláí Krossur:** Saman við hinum samstarvsfeløgunum í Norðurlondum hevur Bláí Krossur í Føroyum eisini, fingið stuðul frá Cirius, sum er stovnur undir Norðurlandaráðnum.

Felagsskapirnir, sum søktu um stuðul frá Cirius, hava fingið játtaðar tilsamans 287.070 krónur.

Peningurin verður eftir ætlan nýttur til at gera eitt norðurlendskt samstarvsnet, har partarnir kunnu skifta orð um royndir viðvíkjandi hjálp móti alkoholmisnýtslu.

**sb.**